## AloeVera umboð á vitjan

Í komandi viku koma Ulla og Marco Devni úr Danmark á vitjan í Føroyum.

Tey umboða kosttilskotið AloeVera, sum man vera væl kent her á landi. Nú ynskja tey at hitta tey mongu, sum selja vørurnar.

Týsdagin verður ein samkoma fyri hesum sølufólkunum hildin í hølunum hjá Almanna- og Heilsurøktarfelagnum í J. Paturssonargøtu.

## Ferðavinnan í kreppu

Danska ferðavinnan er í stórum trupulleikum, tí teir útlendsku gestirnir fækka í stórum, skrivar Ugebrevet Mandag Morgen. Sambært blaðnum er talið á útlendskum gistandi á hotellum, frítíðarmiðstøðum, summarhúsum og tjaldingarplássum minkað 16 prosent tey seinastu tíggju árini. Orsøkin til afturgongdina er, at ferðavinnan heldur fram at dúva upp á tey gomlu tilboðini heldur enn at bjóða fremmendafólki nýggj og áhugaverd tilboð.

# Trongt á arbeiðsmarknaðinum

**Nú er somikið trongt á arbeiðsmarknaðinum, at næstan allir føroyingar eru í arbeiði. Og skulu størv mannast, verður tað mangan av fólki, sum rýmir úr øðrum starvi. Í januar í ár vóru 900 fleiri løntakarar enn í januar í fjør**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Av Hagstovuni verður sagt, at eftir trý ár við ongum vøkstri, er talið av løntakarum nú farið at vaksa við út ímóti somu ferð, sum í nítiárunum.

Frá 2003 til 2006 stóð talið av løntakarum mestsum í stað, men frá miðjum ári í 2006 er rættulig ferð komin á arbeiðsmarknaðin, so at løntakararnir í januar í ár vóru 900 fleiri enn í januar í fjør. Í prosentum er hesin vøksturin 3,6 prosent.

Tølini eru øll grundað á árstíðarjavnaðu uppgerðina av løntakarum, sum Hagstovan letur gera, og vísa tey hækkandi vøkstur seinasta árið.

### Nærum onki arbeiðsloysi

Løntakararnir í Føroyum vóru um ársskiftið á leið 25.400 í tali. Við ársbyrjan 1995 vóru teir um 18.000, og er talið sostatt vaksið við 7.400 hesi seinastu 12 árini.

Øll árini fram til 1999 var arbeiðsloysi meira enn 5 prosent, so at tøk arbeiðsmegi var til ein fittan part av størvunum, sum vórðu boðin fram. Í 1995 vóru 13 prosent arbeiðsleys, í 1996 vóru 10 prosent arbeiðsleys - og so minkaði arbeiðsloysið støðugt sum árini liðu, til arbeiðsloysið var um 3 prosent í 2001.

### Stórur eftirspurningur

Sambært Hagstovuni vaks løntakaratalið tí so hvørt sum arbeiðsloysið minkaði. Somu árini fluttu eisini væl fleiri fólk heim til Føroya enn av landinum, og nógv teirra komu heim at starvast sum løntakarar. At eftirspurningurin eftir arbeiðsfólki er stór í hesum tíðum, sæst av, at arbeiðsloysið er at kalla einki. Ongar kanningar verða gjørdar her á landi av eftirspurningi eftir starvsfólki, men eftir lýsingunum í bløðunum at døma, er tørvurin rættiliga stórur, verður sagt.

### Skifta millum størvini

Tað er heldur útboðið av skikkaðum starvsfólki, sum er avmarkingin í løtuni. Seinastu uppgerðirnar vísa, at arbeiðsloysið í løtuni er lægri enn 2 prosent, sum er óvanliga lítið. Hetta merkir so eisini, at skulu størvini mannast, verður tað mangan av fólki, sum samstundis rýmir úr øðrum starvi.

### Fleiri flyta enn koma

Tí kann vøksturin valla halda fram uttan, at fólkatalið veksur við innfluttum fólki. Seinastu trý árini hevur gongdin kortini verið tann øvugta – at fleiri fólk fluttu av landinum, enn til Føroya. Nógvar orsakir kunnu vera til tess, bæði vánaligir búsetingarmøguleikar, lágt lønarlag, vánaligt veðurlag ella aðrar góðar grundir.

Veðrið fáa vit einki gjørt við, men sosialu korini - eitt nú møguleikar fyri búseting og barnaansing - ber til hjá myndugleikunum at bøta um. Hampiliga stórar útstykkingar og bústaðabyggingar eru í umbúna, og fara at hjálpa nakað upp á trupulleikarnar, men valla so skjótt og so nógv, sum bráðtørvur er á, sigur Hagstovan.

# Javnstøðufyrilestrar í Noðurlandahúsinum

**Mikukvøldið skipar Javnstøðunevndin fyri tveimum almennum fyrilestrum, nú norðurlendsku javnstøðunevndirnar hittast til fundar í Føroyum**

JAVNSTØÐA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Einaferð um árið hittast norðurlendsku Javnstøðunevndinar til fundar, og í ár verður fundurin hildin í Føroyum 10-11. mai við umboðum úr Svøríki, Noregi, Danmark, Finlandi, Íslandi, Grønlandi og Føroyum. Í hesum sambandi skipar Javnstøðunevndin fyri tveimum almennum fyrilestrum mikukvøldið.

### Felags kærustovnur

Fyrri fyrilesturin fer at snúgva seg um nýggja felags kærustovnin í Danmark, sum fer at virka frá 2008. Javnstøðunevndin sigur, at Danmark er í ferð við at umskipa og víðka javnstøðuøkið, millum annað við nýggja stovninum, Klagenævnet for Ligebehandling. Allar kærur frá borgarum um diskriminatión verða savnaðar á hesum stovni. Tað merkir, at borgararnir í framtíðini kunnu kæra til ein og sama stovn, um teir halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, rasu, húðarlit, trúgv, aldur, brek, nationalan, sosialan ella etniskan uppruna, politiska áskoðan ella seksuella orientering. Sum er, kunnu bara tey kæra, sum meta seg vera diskriminerað vegna kyn, rasu ella etniskan uppruna. Nýggi stovnurin avloysir verandi stovnarnar Ligestillingsnævnet og Klagekommitéen for Etnisk Ligebehandling, sum verða niðurlagdir.

Iben Rostock Jensen, ráðgevi í donsku javnstøðunevndini, ber fyrilesturin fram.

### Arbeiði av sama virði

Seinni fyrilesturin verður við Magnus Jacobsson, ráðgeva í svensku javnstøðunevndini, sum fer at røða um evnið: arbeiði av sama virði.

Norðurlendsku javnstøðulógirnar fyriskriva, at menn og kvinnur skulu hava somu løn fyri sama arbeiði og arbeiði, ið verður mett at hava sama virði. Men hvør ásetir virðið á einum arbeiði, og hvussu kann hetta gerast? Svenska javnstøðunevndin, JämO, hevur í nøkur ár arbeitt við einum lønarkortleggingarprojekti, har ymiskar útbúgvingar, arbeiðsfunktiónir, mannagongdir o.a. eru kortlagdar og greinaðar til tess at kunna meta um virðini á teimum ymsu arbeiðunum og lønunum í mun til hvørt annað.

Fyrilestrarnir verða 9. mai kl. 19 - 21 í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum.



*Tað er Rithøvundafelagið, sum saman við Norðurlandahúsinum, hevur boðið kenda finska skaldinum Tua Forsström at koma til Føroya*

# Tua Forsström vitjar í Føroyum

**Kenda finska skaldið Tua Forsström kemur til Føroya, og fer hon hósdagin 10. mai at lesa upp og siga frá sínum skaldskapi í Norðurlandahúsinum**

BÓKMENTIR

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kvinnuligi yrkjarin Tua Forsström er fødd í 1947 í Borgå. Hon er millum kendastu finsku rithøvundarnar nú á døgum og hevur fingið nógvar virðislønir fyri sín skaldskap, teirra millum Edith Södergran virðislønina í 1988, Pro Finlandia heiðursmerkið í 1991, Finlandsvirðislønina hjá Svenska Akademinum 1992. Svenska Akademiið heiðraði hana aftur í 2003, tá hon fekk Bellman virðislønina, ið verður latin framúrskarandi svenskum skaldum, hetta hóast Tua Forsström er finsk (finlandssvensk). Eins og Edith Södergran skrivar hon á svenskum.

Í 1998 fekk hon bókmentavirðisløn norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið Efter at ha tilbringat en natt med hästar. Í síni grundgeving segði ráðið, at verkið er ”eitt marggrundað yrkingasavn við lindum av skemti og sorg. Tað er væl samantvunnið í evni sínum, musikalskt og við sterkari nærveru í núinum.”

Tiltakið, sum er ókeypis, verður í Norðurlandahúsinum hósdagin 10. mai kl. 19.30.